# Sjómannafrádrátturin

GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður



Tað komu nakrar óhepnar útsagnir um okkara sjómenn og høvuðsvinnuna nú um dagarnar.

Har sagt varð, at sjómannsfrádrátturin skuldi vekk, og at inntøkutrygdin skuldi verða fíggjað av reiðarum og sjómonnum.

Eg eri harmur um, at man ger eina óvissu rundan um okkara høvuðsvinnu, mínir tankar fara til føroysku heimini, sum til dømis hava tann føroyska línuflotan sum álit fyri at fáa mat á borðið og at gjalda sítt heim fyri.

Hvat hugsa hesu fólk, sum ikki fáa endarnar at røkka saman, helst eru tey ólukkulig.

Alt hetta meðan tey almentsettu fingu 3% í lønarhækkan, eisini eg sjálvur.

Vit eiga og skulu inn á tann partin hjá tí almenna at spara pening, ikki so, at eg vanvirði tað arbeiði, sum verður gjørt av teimum almentsettu. Men her hugsi eg um tær útreiðslur, sum eru av, at fólk ferðast uttanlands fyri almennar pengar.

Vit skulu øll liva í hesum landinum og ikki bara tey við maskettknappum.

Hetta við aftur og aftur at gera ótryggleika uttan um okkara siglandi fólk, ber ikki til.

Latið okkum nú av øllum alvi royna at fáa arbeiði til allar hendur.

Tað gera vit við at landið setur arbeiðir í gongd, tað var jú meiningin sambært ólavsøkupakkanum.

Og ikki minst at lata kommununar sleppa at útbyggja, nú prísirnir eru í botni, heldur enn at hava kvørkratak á teimum, tí tað er tað sum verður gjørt í dag.

Vit vita væl, at tað er fiskavinnan, sum ber nógv bygdarsamfelag og eisini býarsamfeløg uppi.

Taki eg Sandoynna sum dømi, ja her eru tað flakavirkið, Lívfiskastøðin, útróðrarmenn, sjómenn og onkur smáídnaður og handlar. So vælsignaði, latið okkum sum ráða fyri borgum lata vera við at hótta við at taka matin úr munninum á teimum, sum stríðast í okkara høvuðsvinnu.

Latið okkum royna at fáa fólk í vinnu, tað er loysnin. Tað gerst bara við at land og kommunur seta arbeiðir í gongd.

# Rætting

DÁVUR WINTHER,
mentanarleiðari



Vísandi til grein hjá Randi Jacobsen í Sosialinum 9. februar, við heitunum "Vakmyndatól í Svimjihøllina í Klaksvík" og "Klaksvík áhugað í Bládýpinum", havi eg hesar viðmerkingar

Randi Jacobsen ringdi til mín, tí hon á postlistanum sá eitt mál "Vakmyndatól til Svimjihøllina". So sum vit skiltust í telefonini, so var hetta einki at skriva heim um – heldur ikki um Bládýpið.

**Svimjihøllin**
Tá ið tað verður sagt í greinini, "at tey hava leingi havt varðhugan av, at fólk ofta hava verið inni í høllini, tá ið høllin annars ikki hevur verið opin", so er hetta ikki rætt. Vit halda okkum vita um eitt dømi, har fólk hava verið inni, tá ið høllin annars ikki hevur verið opin.

Tess vegna, og sum liður í vanligum trygdarsiði, hava vit valt at seta talgilda lásaskipan upp og so annars vakmyndatól, sum vit hava fingið loyvi til frá Dátueftirlitinum.

**Bládýpið**
Tá ið eitt mál kemur upp at venda í umsitingini verður tað vanliga skrásett og endar so á postlistanum, sum verður lagdur út á heimasíðuna.

Málið um Bládýpið er reint umsitingarligt, har ein sera óforpliktandi fyrispurningur er settur Helga Fossadal fyri tíð síðan, um møguleikan fyri møguliga at fáa bingjuna til Klaksvíkar. (Hon hevur fyrr ferðast víða). Men so leingi ógreiða er um ognarrætt ella staðseting av Bládýpinum millum Trónda Paturssson, stýrið fyri Listasavnið og stjóran annars, gera vit einki meira við málið og tí er onki í tí, at: "Næsta stigið hjá Klaksvíkar býráð verður at tosa við Trónd Patursson".

Málið hevur ikki verið til nakra politiska viðgerð, tí tað er ikki búgvið til tað enn.

# Føroyskir arbeiðsgevarar røkka nú teim lesandi

*Tíðindaskriv*

Yrkistænastan er eitt nýtt átak, sum skal virka fyri at styrkja sambandið millum føroyska arbeiðsmarknaðin og tey lesandi. Yrkistænastan er ein skipan, sum vendir sær beinleiðis til føroyingar undir útbúgving við upplýsingum um leys størv. Allir arbeiðsgevarar kunnu nýta hesa tænastu, sum fer at virka frá í dag.

Tað er ein sannroynd, at føroyska samfelagið einans kann bjóða ein part av teimum útbúgvingum, ið eru neyðugar í dagsins samfelagi. Tí er tað sera umráðandi, at føroyingar leita sær út um landoddarnar at nema sær førleikar, sum kunnu vera við til at bera okkara land framá. Men tað er samstundis ein trupulleiki fyri føroyska samfelagið, at føroyingar ikki venda heimaftur eftir lokna útbúgving uttanlands. Yrkistænastan er amboðið, sum tryggjar sambandið við føroyingar, meðan teir eru uttanlands í útbúgvingarørindum. Tílíkar skipanir eru eisini at síggja í londunum rundan um okkum.

Tað er Uttanríkisráðið, Vinnuhúsið, Stuðulsstovnurin og Meginfelag Føroyska Studenta, sum standa fyri hesum átaki. Sí fleiri upplýsingar um, hvussu tú sum arbeiðsgevari kanst nýta tænastuna

***Uttanríkisráðið***

# Framtíðar bygnaður á Barna- og ungdómsøkinum

Tíðindaskriv

Hvussu kunnu vit á besta hátt skipa økið Børn og ung, so tey, ið hava serligan tørv, kunnu fáa nøktandi tilboð í Føroyum? Spurningurin er torførur, men átrokandi neyðugur at fáa svarað. Um fáar vikur kemur arbeiðsbólkur við sínum tilmælum.

Í summar setti Rósa Samuelsen arbeiðsbólk at eftirmeta, útgreina og endurskoða tey tilboð og tænastur til børn, sum landsstýriskvinnan á almannaøkinum varðar av. Talan er um eina røð av tilboðum til børn, ung og teirra familjur, sum á ymsan hátt hava serligan tørv. Við støði í útgreiningini ger bólkurin tilmæli um hvussu økið skal skipast frameftir.

Yvirskipaða málið hjá samgonguni er, at vit skulu skapa umstøður, so børn við serligum tørvi í minst møguligan mun verða send av landinum. Heldur eiga tey at fáa nøktandi menningartilboð í Føroyum.

Ein av avbjóðingunum er at skipa soleiðis fyri, at tilboðini og tænasturnar er smidligar og nøkta ein skiftandi tørv. Eina tíð er stórt trýst á ávísan stovn, meðan aðrar tíðir verður stovnurin so at siga ikki brúktur. Samstundis má økið samskipast so skynsamt sum gjørligt, so starvsfólkaorkan og hølisumstøðurnar verða gagnnýttar á allar besta hátt.

Í arbeiðsbólkinum sita umboð fyri barnaverndartænasturnar, Barnaverndarstovuna, Almannastovuna, Nærverkið og Almannamálaráðið.

Álitið hjá arbeiðsbólkinum fer til hoyringar hjá avvarðandi pørtum í vikuni og verður handað landsstýriskvinnuni um hálvan mars.

***Almannamálaráðið***

# Føroya Skipara- & Navigatørfelag gjørt avtalu við Betri pensjón

Tíðindaskriv

Føroya Skipara- & Navigatørfelag hevur avgjørt, at limirnir í framtíðini kunnu velja millum tveir eftirlønarveitarar. Í hesum sambandi er avtala nú gjørd við eftirlønar- og lívstryggingarfelagið Betri pensjón. Avtalan er galdandi frá 1. januar 2010, og stendur tað sostatt limunum frítt at velja frá hesum degi.

Limirnir í Føroya Skipara- & Navigatørfelag fáa nærri kunning um nýggju avtaluna í nærmastu framtíð.

Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara- & Navigatørfelag, sigur, "at limirnir í longri tíð hava eftirspurt hesum valmøguleika. Økt kapping á eftirlønarøkinum kann bara gagna limum okkara. Men vit leggja dent á, at eftirlønin bert kann inngjaldast til góðkendar skipanir."

Mortan Poulsen, stjóri í Betri pensjón, fegnast um nýggju avtaluna og leggur afturat, "vit fara at leggja okkum eftir einum góðum samstarvi, og at veita eina gjøgnumskygda eftirlønarskipan til limirnar hjá Føroya Skipara- & Navigatørfelag. Ein skipan, sum tryggjar framhaldandi vælferð, tá ið farið verður frá fyri aldur, ella um okkurt óvæntað hendir áðrenn eftirlønaraldur."

Føroya Skipara- & Navigatørfelag og Betri pensjón, 9. februar 2010.